Eyðgunn Samuelsen
Beinir Johannesen
Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu
Hanna Jensen
Magnus Rasmussen
Steffan Klein Poulsen
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 61/2022: Uppskot til løgtingslóg um talgilda samleikakortið

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Heitið á løgtingslógini verður: "Løgtingslóg um talgilda samleikakortið"

2. § 1 verður orðað soleiðis:

   "**§ 1.** Talgilda samleikakortið er almenna talgilda samleikaprógvið í føroyska samfelagnum og er javnsett við gildug fysisk samleikaprógv."

3. § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um undantak til kravið um talgildan samleika til fysiska samleikakortið við tí treyt, at onnur krøv verða sett til at eyðmerkja persónar, t.d. við at vísa gildugt samleikaprógv.

Viðmerkingar:

Eftir at Fíggjarnevndin legði fram álit í málinum, og broytingaruppskotið hjá eini samdari nevnd í álitinum varð samtykt við 2. viðgerð, leggja limirnir í Fíggjarnevndini fram hetta broytingaruppskot, sum broytir tríggjar av teimum somu ásetingunum, sum broytingaruppskotið í álitinum.

Í fyrstu atløgu verður heitið á lógini broytt aftur til tað upprunaliga. Í aðru atløgu verður skotið upp at broyta orðingina av § 1, so tað verður púra greitt, at talgilda samleikakortið einsamalt fær støðu sum almenna talgilda samleikakortið í føroyska samfelagnum, umframt at tað verður javnsett við fysisku samleikaprógvini, pass og koyrikort. Triðja broytingin er ein málslig tillaging.

Til nr. 1

Heitið á løgtingslógini verður broytt til at vera í bundnum formi.

Til nr. 2

§ 1 verður broytt soleiðis, at ásett verður, at talgilda samleikakortið er almenna talgilda samleikaprógvið í føroyska samfelagnum, og at tað er javnsett við fysisk samleikaprógv so sum koyrikort og pass.

Sambært ásetingini verður talgilda samleikakortið ikki einasta almenna samleikaprógvið í føroyska samfelagnum, og persónar hava rætt til at velja og fáa atgongd til tænastur við einum fysiskum samleikaprógvi.

Til nr. 3

Hendan broytingin snýr seg bert um eina málsliga tillaging. Við 2. viðgerð varð § 5, stk. 2 broytt til nærum somu orðing sum í hesum broytingaruppskotinum. Tað, sum verður broytt við hesum uppskotinum, er, at orðini "gildugt samleikaprógv" verða sett í staðin fyri orðini "pass ella koyrikort".

Á Løgtingi, 12. mai 2023

Eyðgunn Samuelsen	Beinir Johannesen	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	